Vinnunevndin

28. nov 2019

Tíðin er avmarkað og tað er vónleyst at viðgerða allar tættir í hesum lógaruppskotinum, og tí fari eg at leggja dent á viðurskifti, sum eg meti hava serligan týdning fyri bólkarnar 4 og 5.

Hesi eru:

1. Rættindi skullu *ikki* seljast endaliga á uppboðboði, men skullu avsetast til:
   a. útvegan av nýggjum botnfiskarættindum í fremmandum sjógvi til verandi botnfiskaflota og/ella
   b. verða nýtt til at flyta nøkur av verandi botnfiska feløgum *varandi* yvir í annan fiskiskap – tvs. umbýti av botnfiskarættindum við uppisjóvarrættindi

2. Bólkur 5 er vorðin eitt undantak í okkara fiskivinnulóggavu. Heldur ikki hesa ferð er bólkurin fevndur av lógaruppskotinum, hóast fleiri avbjóðingar m.a. av:
   a. Endurnýggjan/tillaging
   b. Vinnuligt/ikki-vinnuligt virksemi

3. Veiðiloyvisskipan: frá hvørjum og til hvat? – ógreitt!

4. Skiftisreglur ógreiðar

**1.**
Fiskirættindi eru ein fyritreyt fyri eitt og hvørt felag innan fiskivinnuna, hetta uttan mun til um talan er um eitt felag, sum eigur eitt nótaskip, trolara ella ein útróðrarbát.

Eftir eina oyðimarkargongd í meira enn 10 ár eru útlitini fyri tosk og hýsu í føroyskum sjógvi av teimum frægu og tí eisini fyri bólkarnar 4 og 5, men eingin trygd er fyri, at hettar verður varandi.

Um vit hyggja uppá hesi viðurskifti í søguligum høpi, so er mest sannlíkt talan um ein aldukamb. Sum dømi um hetta, so blivu í 2003 veidd uml. 60.000 tons av toski og hýsu tilsamans í føroyskum sjógvi. Í 2006 var hetta talið uml. 27.000 tons.

Talva 1 (viðheft) vísir miðalveiðu av ávikavist toski, hýsu og upsa hjá føroyskum fiskiførum í føroyskum sjógvi í tveimum tíðarskeiðum: tað fyrra frá 1990 til 2009 og tað seinna frá 2010 til 2018.

Talva 1 vísir í høvuðsheitum støddina av tí tilfeingi, sum rættindahavar í bólkunum 2-5 søguliga hava havt atgongd til.

Talva 2 (viðheft) vísir miðalveiðu av ávikavist makreli, sild og svartkjafti hjá føroyskum fiskiførum í sama tíðarskeiðum. Fyri talvu 2 er galdandi, at fyrra tíðarskeiðið vísir faktisku søguligu rættindini av hesum fiskasløgum. Seinna tíðarskeiðið vísir søgulig og nýggj rættindi av hesum fiskasløgum.

Sum tað framgongur, so eru miðalveiðan eftir *toski, hýsu og upsa* nógv *minkað* seinna tíðarskeiðið í mun til fyrrra tíðarskeiðið, fyri tosk og hýsur við meira enn 50 %.

Sum tað framgongur, so er miðalveiðan eftir *makreli, sild og svartkjafti* nógv *vaksin* seinna tíðarskeiðið í mun til fyrra tíðarskeið, fyri makrel við meira enn 500%.

Ógvusliga økingin er fyri ein stóran part endað hjá nøkrum fáum feløgum.

Sambært fyriliggjandi lógaruppskoti, so er ætlanin at selja tann partin av uppisjóvarrættindunum, sum ikki í forhond enn eru vorðin knýtt at ávísum feløgum, endaligt á eini uppboðssølu.

Havandi í huga søguligu upp- og niðurgongdina innan botnfiskaveiðina í føroyskum sjógvi, men eisini tølini, sum talva 1 og 2 vísa, so loyvir MÚ sær at spyrja, hvørja meinging tað gevur, at hesi rættindi – mest sannlíkt – fara til tey feløg, hvørs rættindi dags dato er vorðin fleirfaldað í mun til tíðina fyri 2010.

Hví ikki heldur avseta hesi rættindi til frama fyri botnfiskaflotan. Hetta kundi verið gjørt sum vit vísa til omanfyri: antin við at hesi verða nýtt sum umbýtisrættindi við botnfisk í fremmandum sjógvi ella við at botnfiskarættindahavarum stendur í boði at avhenda síni rættindi í umbýti við nevndu uppisjóvarrættindi.

Hetta hevði verið ein loysn sum fynd var í – ein win-win støða. Báðar hesar loysnir høvdu havt við sær eitt lønandi alternativ til botnfiskaveiðu føroyskum sjógvi umframt at veiðitrýstið á føroyska landgrunninum hevði minkað – men kortini hevði tilfeingisgrundarlagið hjá eftirverandi aktørum verið størri og sannlíkindi høvdu verið fyri lønandi vinnu, eftirsum rásarúmið hjá eftirverandi botnfiskaaktørum á føroyska landgrunninum gjørdist størri

MÚ sær fram til, at tað fer at síggjast aftur í álitinum frá Vinnunevndini, at hetta alternativið til uppskotið frá landsstýrismanninum hevur fingið eina reella viðgerð.

**2.**

Sjálvt *smáar* lógarbroytingar kunnu yvir tíð viðføra, at *stórar* innanhýsis forskjótingar av rættarstøðum íkoma. MÚ skal í hesum sambandi vísa til Løgtingsmál nr. 65/2001 (Løgtingslóg nr. 38 frá 26. mars 2002), har verður m.a. sagt, citat:

> *"Høvuðsreglan í verandi skipan er, at eisini teir smærru útróðrarbátarnir í bólki 5 bæði skulu hava veiðiloyvi og fiskiloyvi fyri at kunna avreiða.*
> ......
> *Til tess at gera skipanina við smábátum einfaldari og smidligari, verður tí skotið upp, at útróðrar-bátar undir 15 tons verða undantiknir høvuðsregluni um, at øll fiskifør skulu hava veiðiloyvi.*
>
> *Uppskotið miðar ímóti, at fiskifør í bólki 5 í framtíðini bert skulu hava fiskiloyvi. Fiskiloyvini skulu tó hava somu støðu sum veiðiloyvi hava og skulu viðgerast eftir somu reglum sum veiðiloyvi, .....*

Sjálv um tað framgekk, at rættindahavarar í bólki 5 fult og heilt skuldu viðgerast sum allir aðrir rættindahavarar, so tykist henda lógarbroyting í 2002 at hava viðført, at rættindahavarar í bólki 5 onkursvegna hava mist status *sum veruligir rættindahavarar*.

Bólkur 5 er meira at kalla burturtagdur, og hettar endurspeglast í, at oftast, tá ið broytingar verða viðgjørdar, so er tað vorðin ein afturvendandi og endalig viðmerking, at "bólkur 5 er undantikin". Hetta lógaruppskotið er einki undantak í somáta.

a. Endurnýggjan/tillaging

Í hesum lógaruppskoti verður lagt upp til fleiri broytingar, tí tað verður mett at vera neyðugt, m.a. í samband við flytan/avhendan av fiskirættindum, skynsama gagnnýtslu av fiskirættindum ella í samband við endurnýggjan av fiskiførum.

MÚ er av teirri fatan, at útróður – eisini í bólki 5 – er vinnuligur, og at eigarar av hesum fiskiførum hava sama tørv sum aðrir rættindahavarar at tillaga seg fyri at kunna gagnnýta rættindini/marknaðarstøðuna optimalt. MÚ ynskir ikki nakrar serskipanir fyri rættindahavarar í bólki 5, men ynskir bert, at hesir verða viðgjørdir sum aðrir rættindahavar.

Eitt dømi um lógarforðing fyri tillaging er, at tað ikki er loyvt at leggja tvey ella fleiri (veiði)loyvu í bólki 5 saman i samband við útskiftan/endurnýggjan av fiskifari.

b. vinnuligt/ikki-vinnuligt virksemi

MÚ hevur onga avgjørda meining um, hvørji "kriteria" skullu verða avgerandi fyri, hvør kann verða roknaður sum vinnuliga ella partvís vinnuliga rikin. Tað skerst hinvegin ikki burtur, at hetta hevur verið eitt evnið, sum hevur verið uppi og vent aftur og aftur, men eingin endalig politisk loysn er funnin – tvørturímóti.

Nakað, sum kann hesa lýsa støðuna er, at í 2010 – tá fiskiskapurin var søguliga lágur – var eitt niðara mark uppá 400.000 kr í avreiðingarvirði ásett til tess, at ein kundi verða roknaður sum fult rikin. Í 2019 – tá fiskiskapurin rættuliga var komin fyri seg aftur – var hetta markið sett niður í 200.000 kr.

Við potentiella talinum av loyvum í bólki 5 – og um fiskiskapurin heldur sær og einki verður gjørt – so kann væl hugsast, at dagar fara at mangla og at menn, sum hava innrættað seg til at hava útróður sum livibreyð burturav, ikki fáa eina nøktandi ársinntøku.

### 3. Veiðiloyvisskipan: frá hvørjum og til hvat? – ógreitt

Undanfarna samgonga gjørdi nógv burturúr, at veiðiloyvini vórðu avtikin – *at rættindi vórðu loyst frá stálinum*.

Sitandi samgonga ger nógv burturúr, at veiðiloyvini nú aftur verða innførd – *at rættindi aftur verða knýtt at stálinum*.

Tað er greitt, at veiðiloyvið onkusvegna hevur stóran tydning, men tað er sera sera ógreitt, hvør hesin týdningurin í roynd og veru er.

Í LUM máli nr.: 200100004, møttu ikki færri enn 3 embætisfólk úr Fiskimálaráðnum á fundi hjá LUM. Á s. 16 framgongur citat:

> *Til fundin vóru møttir: -vegna Fiskimálastýrið: (L), (M) og (N). vegna umboðsmannin: Joen H. Andreassen (JHA) og Johnhard Klettheyggj (JK). Ymsu hugtøkini í lógini um vinnuligan fiskiskap vóru umrødd, og (L) greiddi frá, at heitið:*
>
> ***Veiðiloyvi** stavar frá 1987 og er ein góðkenning, sum knýtir seg afturat tí einstaka skipinum / bátinum. **Fiskiloyvi**, sum viðvíkur sjálvum fiskirættindunum og er knýtt at tí einstaka persóninum / felagnum, men sum er **óheft** av tí einstaka fiskifarinum.*

Í frágreiðing til aðalorðaskiftis um fiskivinnu í Løgtingsmáli nr. 101-04/2000 s. 46, sigur Fiskimála-ráðið, citat:

> *Tá skipanin við veiðiloyvum varð sett í gildi í 1987, staðfesti hetta rættin hjá summum at fáa skip og rættin til at veiða á føroysku landleiðunum, og til tey rættindi, sum Føroyar hava samráðst seg til.*

Í § 1 í kunngerð nr. 54 fra 1993 framgongur eksplisitt, at *øll sum eiga fiskifør,* skulu hava veiðiloyvi.

> *Við tí endamáli at fyriskipa veiðiorkuna ... og at loyva skynsama nýtslu av tøkum veiðirættindum, **skulu øll, sum eiga fiskifør** ...... **hava veiðuloyvi** til fiskiskap á teimum leiðum, við tí reiðskapi og eftir teimum fiskasløgum, sum eru nevnd niðanfyri: I.) a-k og II) a-k*

Í § 2 í kunngerðini verða tvey veiðiloyvi nevnd: eitt *spesifikt* veiðiloyvi, sum knýtir seg at ávísu rættindunum (átekningini í sjálvum veiðiloyvinum) umframt eitt *alment* veiðiloyvi:

> § 2. *Umsóknir um veiðuloyvi verða at senda Føroya Landsstýri. Einki skip kann fara til fiskiskap uttan veiðuloyvi. Tað er skylda skiparans at hava veiðuloyvið um borð. Skip, sum ikki hava veiðuloyvi sbrt. § 1 mugu søkja Føroya Landsstýri um loyvi. Fyri veiðuloyvi sambært I. d), h) i) j) og k) og II. a)–k) krevjast umframt alment veiðuloyvi serlig fiskiloyvi.*

Er ella hvør er munurin á spesfikka veiðiloyvinum, sum vísir til slag av rættindum (átekningina *I. a)- k) og II. a)–k)*) *og á almenna veiðiloyvinum?*

Tá fiskirættindi í lógini um vinnuligan fiskiskap sambært Fiskimálaráðnum vóru *óheft* av tí einstaka fiskifarinum, hvussu skal tað so skiljast, tá a) hesi í verandi lóg blivu loyst frá stálinum og at b) hesi nú aftur skullu knýtast at stálinum?

*Skilir Vinnunevndin hendan samanhangin?*

Fiskirættindi innan fiskidagaskipanina blivu sambært Fiskimálaráðnum, í mai 2019 loyst frá stálinum. Við hesi lógarbroyting bleiv skipanin við bólkarættindum innan fiskidagaskipanina sambært Fiskimálaráðnum partvís avtikin!

Sambært Fiskimálaráðnum var tað brádliga einki í lógini longur, sum forðaði fyri, at fiskirættindi hjá bólki 2 (rættindi I. *b)* í veiðiloyvinum) umvegis avhendan og flytan gjørdust fiskirættindi hjá bólki 4T (rættindi I. *a)* í veiðiloyvinum).

Sambært Fiskimálaráðnum var tí einki longur sum løgliga forðaði fyri, at fiskiorka hjá bólki 2 og 3 umvegis flytan og avhendan av fiskidøgum varð flutt til ávikavist bólk 4 T og 4 A og B

*Var hetta viðgjørt í Vinnunevndini? Var hetta ætlanin hjá Vinnunevndini?*

Soleiðis sum fyriliggjandi lógaruppskotið er orðað, er Vinnunevndin so greið yvir fullu avleiðinrarnar av lógaruppskotinum?

Vegna MÚ

*Óli Jacobsen*